Vinnumálaráðið

Dagfesting:	5. mai 2026
Mál nr.:	26/10914
Málsviðgjørt:	uk
Ummælisfreist:	N/A
Eftirkannað:	24.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin)
(Um at leingja sólseturáseting í fjarskiftislógini)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 42 frá 16. mai 2024 um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin) verður § 2, stk. 2, orðað soleiðis:

"*Stk. 2*. § 58 a fer úr gildi tann 31. mai 2027."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við heimild í § 58 a í fjarskiftislógini kortleggur og skannar Fjarskiftiseftirlitið føroyska undirstøðukervið. Royndirnar og vitanin, sum eru komnar við kortleggingini og skanningini hava verið týðandi partur í arbeiðinum at fyrireika lóg um nettrygd. Eisini heimilar § 58 a, at Fjarskiftiseftirlitið kann boða fyritøkum og stovnum frá, um kortleggingin ella portraskanningin avdúkar veikleikar ella vandar í teirra net ella kunningarskipanum.

Undir viðgerðini av løgtingsmál LM-098/2023 um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti (Fjarskiftislógin) (Ásetingar um kortlegging og skanning í sambandi við nettrygd og um at nágreina ásetingar um at savna upplýsingar) setti vinnunevndin fram broytingaruppskot um sólseturáseting galdandi fyri § 58 a til 31. mai 2026.

Ásetingar um kortlegging og portraskanning í fjarskiftislógini skuldu eftir ætlan setast úr gildi við løgtingslóg um nettrygd, sum varð latin Løgtinginum fyrr í ár og fall burtur. Ætlanin er at leggja uppskot um løgtingslóg um nettrygd fyri Løgtingið komandi setu.

1.2. Galdandi lóggáva
Eftir galdandi reglum fer løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti úr gildi tann 31. mai 2026.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at leingja sólseturásetingina til 31. mai 2027 og heimila Fjarskiftiseftirlitinum at halda fram við arbeiðinum at kortleggja og portraskanna eins og at boða frá um veikleikar og vandar, til Løgtingið hevur tikið støðu til uppskot til løgtingslóg um nettrygd.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
§ 58 a í fjarskiftislógini um kortlegging og skanning í sambandi við nettrygd fer úr gildi tann 31. mai 2026. Fyri at heimila Fjarskiftiseftirlitinum at halda fram við arbeiðinum at kortleggja og skanna føroyska undirstøðukervið eins og at boða frá um veikleikar og vandar, til Løgtingið hevur tikið støðu til, um løgtingslóg um nettrygd verður sett í gildi, verður skotið upp at leingja sólseturásetingina við einum ári.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis. Talan er ikki um innihaldsligar broytingar, uttan at sólseturásetingin verður longd við einum árið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at Fjarskiftiseftirlitið kann halda fram við virkseminum í sambandi við kortlegging og portraskanning. Uppskotið hevur ikki beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri aðrar stovnar undir landi og kommunum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Kortlegging av undirstøðukervinum er fyri stóran part gjørd, men í tann mun vinnufyritøkur skulu lata Fjarskiftiseftirlitinum upplýsingar um undirstøðukervið, hevur hetta í avmarkaðan mun við sær, at hesar fyritøkur nýta tíð og orku til tess at luttaka í kortleggingini.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið uppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne aflov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Mett verður ikki, at uppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skyldur. Við at leingja sólseturásetingina hava løgfrøðiligir og likamligir persónar framhaldandi skyldu at lata upplýsingar um sítt undirstøðukervi. Uppskotið hevur ikki ásetingar um tiltøk at seta í verk, um myndugleiki, fyritøka ella persónur ikki letur upplýsingar.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskot leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella kommunur. Við at leingja sólseturásetingina verður framhaldandi heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um, hvat virksemi, undir hesum upplýsingar o.a., er fevnt í sambandi við kortlegging sambært § 2, stk. 6, og sambært § 58 a, stk. 12, kann landsstýrisfólkið áseta reglur, sum í størri mun nágreina ella fevna um at lata upplýsingar víðari.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið fevnir ikki beinleiðis um viðgerð av persónupplýsingum. Tó verða persónupplýsingar, so sum samskiftisupplýsingar hjá kontaktpersónum, viðgjørdar í sambandi við kortlegging av undirstøðukervinum. Eisini verða samskiftisupplýsingar viðgjørdar, um Fjarskiftiseftirlitið fráboðar eind um veikleikar ella vandar.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Skotið verður upp at leingja sólseturásetingina við einum ári. Ætlanin er at leggja uppskot til løgtingslóg um nettrygd fyri Løgtingið í heyst.

Til § 2
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 5. mai 2026

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur